## Icesave onga ávirkan

Teir flestu limirnir í uttanríkisnevndini hjá Evropatinginum siga, at ríkis- og stjórnarleiðararnir eiga at taka undir við, at ES skal samráðast við Ísland um limaskap, sama um ein nýggj avtala er fingin um Icesave-skuldina ella ikki. Ríkis- og stjórnarleiðararnir hittast seinni í hesum mánaðinum. Kommiserurin Stefan Füle, sum umsitur umsóknir um limaskap í samveldinum, segði mánadagin, at ósemjan millum Ísland øðrumegin og Bretland og Niðurlond hinumegin um Icesave eigur ikki at ávirka gongdina í málinum um møguligan íslendskan limaskap í samveldinum.



## Krevja meiri mat

Fyrradagin segði forsetin í Haiti, René Preval, at umheimurin sendir alt ov nógva neyðhjálp til Haiti, og hann bað USA og onnur lond senda minni. Hetta tykist eitt sindur ørkymlandi, tí í gjár mótmæltu fólk í einari legu nærhendis høvuðsstaðnum Port-au-Prince, at tey fáa ov lítið at eta. Ein talsmaður hjá ST sigur, at meiri enn ein millión fólk eru í leguni, og at tey hava kært seg um, at legan hevur ikki fingið matvørur í fleiri vikur. Í gjár stongdu mótmælisfólk vegin til høvuðsstaðin, til løgreglan rak tey burtur.







# Partabrøvini hækkað seinastu vikuna

**Partabrævamarknaðirnir eru allir hækkaðir seinastu vikuna, og tað eru serliga teir europeisku marknaðirnir, ið standa seg væl. OMX C20 hækkaði við 3%, meðan bæði týska DAX og bretska FTSE100 hækkaðu við 4,8%, sigur Føroya Banki í vikukunning síni**

PARTABRØV

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Farna vika hevði ein hóp av búskaparligum tíðindum. ISM-vísitølini, arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin úr USA og rentufundir hjá ECB og Bank of England vóru nøkur av teimum mest tyngjandi fyri marknaðirnar.

ISM-vísitølini fyri framleiðslu- og tænastugeiran vórðu kunngjørd ávikavist seinasta mánadag og mikudag.

Framleiðslugeirin fall úr 58,4 niður í 56,5. Sjálvt um eitt fall var væntað, so gjørdist tað størri enn roknað var við. Tænstugeirin vísti hinvegin eina framgongd úr 50,5 upp í 53, og tað var so aftur fyri nakað meira, enn marknaðurin hevði væntað.

Væntanirnar til ISM vísitølini eru grundleggjandi, at hesi fara at halda sær í 50-unum, sum er tekin um búskaparliga framgongd, men at framgongdin fer at verða varlig, nú tey ymisku hjálpitiltøkini frá tjóðbankanum byrja at detta burtur.

Væntandi fer amerikanski tjóðbankin saman við tjóð- og miðbankum kring heimin at stegða hjálpartiltøkunum aftur, so hvørt sum búskapirnir byrja at vaksa aftur soleiðis, at tað verður javnvág millum búskaparvøksturin og afturtøkuna av hjálpartiltøkunum. Tí væntast ein hóvligur búskaparvøkstur komandi tíðina.

### Grikkaland á skránni

Grikkaland hevur eisini verið nógv á skránni seinastu vikurnar. Stjórnin hevur lagt uppskot fram fyri at minka um undirskotið á fíggjarlógini og fyri at minka um skuldina. Hetta varð væl móttikið frá umheiminum, men stak illa frá grikkum sjálvum, sum boðaðu frá verkfalli.

Eisini lat Grikkaland upp eina lánsbrævarøð á umleið fimm milliardir evrur, sum bleiv yvirteknað tríggjar ferðir. Hetta eru positiv tíðindi, tí tað merkir, at íleggjarar framvegis trúgva upp á Grikkaland og eru áhugaðir í at gera íløgur har.

ECB og Bank o England hava havt rentufundir í síðstu viku, har leiðandi útlánsrenturnar vórðu hildnar óbroyttar á ávikavist 1% og 0,5%. ECB boðaði eisini frá, at teir so líðandi komandi árið fara at taka aftur tey hjálpartiltøk, teir settu í verk.

Hinvegin kom Bank of England ikki við nakrari ábending um nær teirra »exit-strategi« byrjar, tí tað hevur verið og er munandi verri at fáa gongd aftur á búskapin í Onglandi.

Nýggjasta arbeiðsmarknaðarfrágreiðin gin úr USA vísti, at arbeiðsloysið ikki veksur eins skjótt, sum áður hildið. Marknaðurin hevði væntað eitt arbeiðsloysi fyri febsuar á 9,8%, men tað vísti seg at vera »bert« 9,7%.

Partabrævamarknaðirnir hava tikið væl ímóti nýggjastu arbeiðsmarknaðartølunum, og eru tað serliga tey syklisku partabrøvini, sum hækka, skrivar Føroya Bank í vikukunning síni.



*Grikkaland er fyri okkum eitt hitt mest idylliska staðið í heiminum, men grikkar sjálvir eru í hesum døgum í øðini inn á stjórnina og hennara strammu fíggjarligu kós*